FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

16. august 2021
Mál: 21/15347-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-005/2021

**Svar til fyrispurning 52-005/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um veiðirættindi og friðingar.**

**Spurningar:**

1. Hvussu leingi hevur eystari kantur av Føroyabanka verið friðaður?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at geva trolarum, sum royna eftir svartkalva, betri trolleiðir á djúpari leiðunum á eystara kanti av Føroyabanka?
3. Hevur landsstýrismaðurin í hyggju at geva svartkalvabátunum betri veiðirættindi og møguleikar?

**Svar:**

**Til nr. 1.**
Eystari kantur av Føroyabanka hevur verið friðaður part av árinum síðani mars í 1993.

**Til nr. 2.**
Ongin ítøkilig ætlan er í viðgerð um at geva trolarum betri trolleiðir á djúpari leiðunum á eystara kanti av Føroyabanka.

**Til nr. 3.**
Sum landsstýrismaður eri eg altíð opin fyri at fremja broytingar, ið kunnu betra um veiðimøguleikar hjá fiskiflotanum í síni heild.

Ein treyt fyri at fremja slíkar broytingar er millum annað, at broytingarnar verða skipaðar sum burðardyggur fiskiskapur, eins og at tær verða viðgjørdar í eini heildarmeting, sum fevnir um allar vinnubólkar í føroyska fiskiskapinum.

**Jacob Vestergaard**
*landsstýrismaður*

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo